

Marine Harvest er størsta alifelag í heiminum, og verður triði hvør aldur laksur framleiddur í einum Marine Harvest felag. Í Føroyum rekur Marine Harvest 4 alibrúk og eina smoltstøð, og framleiða vit 6.000 tons av laksi um árið.

# Starvsfólk til planlegging og logistik á Marine Harvest Faroes

Vit hava tørv á einum persóni til søludeild okkara. Tú skalt taka tær av planlegging av sølu til keyparar okkara í útlondum.

**Uppgávan kann býtast upp í:**

**Planlegging:**
- har samskift verður við kryvjivirkið, um hvussu laksurin skal pakkast.
- at halda skil á, hvussu nógv skal seljast ímun til framleiðslu.

**Logistik:**
- Samskiftast skal við flutningsfeløg og kundar um, hvussu fiskurin skal flytast úr Føroyum fram til kundan.

**Pappírir:**
- Tá ordrar eru pakkaðir, skulu fakturar gerast til kundan. Verður laksurin seldur uttanfyri ES, skulu eisini onnur flutningspappírir útfyllast.

**Søla**
- Tú skalt hjálpa til at samskifta við keyparar, selja, áseta prísir og optimera flutningskostnað. Halda skil á saldo og tryggingum hjá kundanum.

Samskift verður við telduposti, Skype og telefon.

**Førleikar**
- Teldukunnleika til Office forritini. Enskt er eitt krav, tí samskift verður við kundar á enskum máli. Tú skalt vera skjót/ur til tøl, megna at taka skjótar avgerðir og arbeiða sjálvstøðug/ur.

**Útbúgving: Miðnám.**

**Umstøður**
- Arbeiðsplássið verður á Bryggjubakka í Havn. Fartelda og fartelefon eru amboðini, tú skalt brúka. Vit sóknast eftir einum persóni, sum kann arbeiða skeivar tíðir.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einari altjóða fyritøku, har tú fært møguleika til at arbeiða í fleiri mentanum í senn.

Umsóknir skulu sendast inn skjótast gjørligt og í seinasta lagi 10. november. Viðkomandi skal byrja beinanvegin. Løn sambært avtalu. Umsóknir skulu sendast til Hans Jákup Mikkelsen, søluleiðara á telduposti: hjm@marineharvest.fo. Um tú hevur tørv á at vita meira um starvið, so ring til mín á 791001.

**www.marineharvest.com**

marineharvest
excellence in seafood

---

ÚTBÚGVINGAR

# RÁÐSTEVNAN 08

## Endurskoðan av yrkisútbúgvingarskipanini

www.mmr.fo

## Á Hotel Føroyum
## 12. november 2008

Ráðstevnan er ætlað øllum teimum, sum á ein ella annan hátt varða av og hava áhuga í yrkisútbúgvingunum og skipanini av útbúgvingunum, tað verið seg yrkisútbúgvingarráð og yrkisnevndir, læurupláss, skúlar/lærarar, lærlingar/næmingar, virkir, arbeiðsgevara- og løntakarafeløg, almennir stovnar, politikarar o.o.

Á ráðstevnuni luttaka m.a. gestarøðarar úr Íslandi, Noregi og Danmark. Ráðstevnan er almenn og er ókeypis.

### Skrá

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 | **Formaðurin í endurskoðanarnevndini bjóðar vælkomin** |
| Kl. 10.15 | **Landsstýriskvinnan í skúlamálum flytir fram røðu** |
| Kl. 10.30 | **Fyrilestur 1:** Egill Guðmundsson, skúlastjóri á Tækniskólinn í Reykjavík, greiðir frá, hvussu yrkisútbúgvingarnar verða skipaðar í Íslandi |
| Kl. 11.15 | **Steðgur** |
| Kl. 11.45 | **Fyrilestur 2:** Hans Th. Hjort, menningarráðgevi á Aarhus Business College, greiðir frá, hvussu kvalifiserað upplæring verður tryggjað |
| Kl. 12.30 | **Steðgur** |
| Kl. 13.15 | **Fyrilestur 3:** Bente Søgaard, seniorráðgevi í vaksnamannaútbúgvingum (VOX) í Noregi, greiðir frá, hvussu tey byrjaðu teirra realførleikameting og vaksnamannaútbúgving |
| Kl. 14.00 | **Steðgur** |
| Kl. 14.30 | **Samanumtøka og hugleiðingar** Eyðun Gaard, nevndarformaður í endurskoðanarnevndini |
| Kl. 15.00 | **Endi** |

MENTAMÁLARÁÐIÐ